# ítróttur

Nr. 168 • týsdagur • 6. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Heimsins besti

**Hóast hann ikki hevði tann stóra tørvin at staðfesta seg hesaferð, so gav Zinedine Zidane í løtum boð um, hví hann verður mettur sum besti spælarin seinastu 10-15 árini**



*Heimsins besti - hvørki meira ella minni. Hóast menn sum Hagi, Laudrup, Stojkovic, Giggs, Nedved og aðrir hava talst millum mótstøðumenninar hjá føroyska landsliðnum, so var talan um sjáldsama og framúr fótbóltsframsýning, sum Zinedina Zidane gav bæði fronskum og føroysku áskoðarum teir 58 minuttirnar, sum hann var á vøllinum leygardagin.*

ZIDANE
*Jákup Mørk*

Frá teiri løtu, at liðini komu á vøllin til upphitingina, var stemningurin millum áskoðararnar í toppi. Hvørja ferð Zidane bara spældi sær við bóltinum ella vandi okkurt skotið, rungaðu lógvabrestirnir hvøllir, og tá farast skuldi undir dystin, kom enn meira ljóð á.

»Zidane« rungaði tað frá samfullum 45.000 áskoðarunum, tá stadion-varpartin las nøvnini upp í eyðkenda stílinum, har fornavnið fyrst varð lisið, áðrenn áskoðararnir svaraðu við eftirnavninum.

Og á vøllinum snúi tað mesta seg eisini um stóra bóltsnillingin, sum hóast algiersku røtur sínar er størsta tjóðarhetjan, sum Frakland hevur átt innan fótbóltin. Ein ylur fór gjøgnum fjøldina, hvørja ferð hann nart bóltin, og tað gekk heldur ikki leingi, áðrenn hann gav valuta fyri peningin. Hóast Fróði Benjaminsen mest sum alt fyri eitt jarðlegði Zizou, tóktist hetta á ongan hátt at nerva spæl hansara. Heldur havði tað við sær, at hann bara syrgdi fyri at sleppa heilt undan fríspørkum við kvikum fintum og sendingum, soleiðis at føroysku mótstøðumenninir sjáldan komu so nær, at teir yvir høvur kundu gera fríspark.

Eyðkendu finturnar, har hann traðkar á bóltin í vendingini, ella har steppað verður um bóltin vóru á skránni, eins og hann í onkrum førum hevði bæði hæl og tá við í spælinum. Tað er bara eitt orð, sum veruliga er nøktandi, um metast skal um avrikið. Heimsflokkur.

Tíverri fingu áskoðararnir ikki høvi at uppliva hann longur enn í knappan tíma á hesum sinni. Tá hevði hann júst fingið eina heldur harðliga tackling frá Inga Højsted, og hóast talan als ikki var um skaða, so mundi avgerðin vera, at beinini skuldu sparast. Fyri framman stendur Írland, og tá verður helst talan um øðrvísi og størri uppgávu hjá Zidane & co. Írland við Roy Keane, sum eisini telist millum teir stóru seinastu 15 árini, stendur tá fyri framman, og so kann væl verða, at tørvurin á Zizou er enn størri, enn hann var tað leygardagin.

## Pauli fyri Toda

Tað verður Pauli G. Hansen av Skála, sum skal loysa Toda Jónsson av í føroyska landsliðshópinum.

Tað var avgerðin, sum føroysku landsliðsvenjararnir tóku, tá nýggjur maður skuldi finnast í hópin.

Við sportalin segði Pauli, at hann er sera fegin um úttøkuna, og at hann vónar, at tað skal bera til at fáa frí frá starvinum hesar dagarnar, sum landsliðshópurin er savnaður.

Pauli G. Hansen er miðvallari, men fyri tað tykjast áleyparar ikki at resta í føroyska hópinum. Undan Fraklands-ferðini varð Jónhard Frederiksberg tikin út fyri leikbannaða Johan Byrial Hansen, so í so máta er býtið millum keturnar nú tað sama, sum tað var til dystin móti Kypros.

Hinvegin tykist hetta vera ein ábending um, at Johan Byrial Hansen spældi seg mest sum úr hitanum í dystinum móti Kypros. Hann var sjálvandi leikbannaður til dystin móti Fraklandi, men at ein maður, sum seinast var millum teir fyrstu ellivu, ikki verður slúsaðust aftur í hópin, nú fráfall hevur verið, kundi bent á, at venjararnir ikki síggja hann sum ein essentiellan part av hópinum.

**-mørk**



*Tað verður liðformaðurin hjá Skála, Pauli G. Hansen, sum skal loysa Toda Jónsson av í føroyska hópinum*

## Mansell: Ferrari eru bidnir um at hvørva



*Nigel Mansell koyrdi fyri Ferrari kappingarárini 1989-1990*

Gitingarnar í formel 1 plaga um hetta mundið á formel 1 árinum at vera um, hvør koyrir á hvørjum liði næsta ár. Men í vikuni gitti fyrrverandi Ferrari koyrarin og formel 1 meistarin Nigel Mansell um eina stóra formel 1 samansvørjing. Hann segði seg ikki skilja, at Ferrari kann vera so langt afturi í ár, aftan á at hava domineráð formel 1 í so nógv ár. Hann helt at tað tykist, sum um onkur hevði biðið Ferrari um at hvørva úr oddastríðnum í ár.

Danski rasarakoyrarin Marrtin Jensen var í sendihølinum hjá TV2 sunnudagin, hann segði seg vera sannførdan um, at okkurt gongur fyri seg aftan fyri leiktjøldini í formel 1. Ferrari hava smurt alt av í nógv ár, men eru í ár heilt steðgaðir upp, og fingu t.d. ongan bil í stigini á Monza hetta vikuskiftið. Spenningurin í formel 1 fall nakað væl, tá Michael Schumacher kundi kalla seg heimsmeistara tíðliga hvørt kappingarár, og hetta gekk út yvir hyggjaratølini.

Tað at onnur lið blanda seg í oddastríðið hevur fingið meira spenning í aftur formel 1, og tí koma slíkar gitingar. Tað er tó ivasamt hvussu nógv hald er í hesum.

**-nud**



*Fróði Benjaminsen fekk alt fyri eitt fatur á Zidane, men í longdini var hetta ikki nóg mikið til at steðga franska bóltsnillinginum*